# Námsskipan fyri B.A. í listaligum arbeiði

# Fróðskaparsetur Føroya

Januar 2024

INNIHALD


1 Inngangur ....................................................................... 4
2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum ....................................................................... 4
3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL) ....................................................................... 4
4 ECTS-áseting ....................................................................... 4
5 Upptøkukrøv ....................................................................... 4
6 Endamál við útbúgvingini ....................................................................... 5
7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum ....................................................................... 5
8 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini) ....................................................................... 7
9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti: ....................................................................... 8
9.1 Bygnaður ....................................................................... 8
9.2 Innihald ....................................................................... 10
9.3 Arbeiðsbyrða og lestrarevni ....................................................................... 10
9.3.1 ECTS (European Credit Transfer System) ....................................................................... 10
9.3.2 Allýsing av lestrarevnum ....................................................................... 10
9.3.3 Sjálvlestur ....................................................................... 11
9.3.4 Lestrarlistar ....................................................................... 11
9.4 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini ....................................................................... 12
9.4.1 Mentorskipan ....................................................................... 12
9.5 Starvsvenjing ....................................................................... 12
9.6 Endalig verkætlan og ritgerðir ....................................................................... 12
9.6.1 Innlating av endaligari verkætlan og ritgerð og møguligar seinkingar ....................................................................... 13
9.7 Skráseting ....................................................................... 13
9.7.1 Innskriving ....................................................................... 13
9.7.2 Stakgreinalestur ....................................................................... 13
9.7.3 Avriksflutningur av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum ....................................................................... 14
9.7.4 Lokin skeið eftir eldri námsskipanum ....................................................................... 14
9.7.5 At skifta leið ....................................................................... 14
9.8 Próvtøkur ....................................................................... 14
9.8.1 Almennar reglur um próvtøkur ....................................................................... 14
9.8.2 Rættstundis innlating ....................................................................... 15
9.8.3 Verk, tekstir og blaðsíður ....................................................................... 15

9.8.4 Heimauppgávur ... 15
9.8.5 Bólka- og einstaklingsuppgávur ... 16
9.8.6 Egið avrik ... 16
9.9 Próvtøkuhættir ... 16
9.9.1 Munnlig og skrivlig próvtøka ... 16
9.9.2 Heimauppgávur ... 16
9.9.3 Avriksmappa ... 17
9.9.4 Verklig próvtøka ... 17
9.10 Próvreglur ... 17
9.10.1 Próvtøka ... 17
9.10.2 Sjúka ... 18
9.11 Próvtøkuhald ... 18
9.11.1 Møting ... 18
9.11.2 Hjálparamboð ... 18
9.11.3 Sjúka við próvtøkuhaldið ... 18
9.11.4 Um at fara frá próvtøku ... 19
9.11.5 Próvtøkutíðin lokin ... 19
9.11.6 Próvtøkuúrslit ... 19
9.11.7 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini ... 19
9.11.8 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming ... 20
9.11.9 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið ... 21
9.11.10 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka ... 21
9.12 Undirvísingarmál ... 22
9.13 Farloyvi ... 22
9.14 Altjóða útbúgvingarmøguleikar ... 22
9.15 Luttøkuskylda ... 22
9.16 Lestrarvirkni ... 22
9.16.1 Lestrarvirkni og lestrarstuðul ... 22
9.17 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum ... 23
9.18 Kærumøguleikar ... 23
9.19 Vísindaligt rættlæti ... 23
9.20 Nær studentar í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv ... 23
9.21 Treytir um broyting í námsskipan ... 23

# 1 Inngangur

Í hesum hefti er námsskipanin fyri lesturin í Útbúgvingini í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini. Námsskipanin er ásetingarnar fyri innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint.

Námsskipanin er grundað á løgtingslóg og kunngerð um Fróðskaparsetur Føroya og fylgir Bolognayvirlýsingini um eina evropeiska útbúgvingarskipan.

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett studentinum, og hvørji rættindi og skyldur ein hevur sum studentur á Útbúgvingini í listaligum arbeiði.

Námsskipanin er galdandi ta tíð, lesturin er ásettur at vera. Um studentur vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn studenturin hevur staðið allar próvtøkurnar, má studenturin gera avtalu við fyrisitingina um, hvussu lesturin verður fullførdur.

# 2 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum

B.A. í listaligum arbeiði

Bachelor of Arts in Creative Arts

# 3 Útbúgvingarstig (sbrt. QF – EHEA; EQF - LLL)

BA, "1st Cycle" sambært QF-EHEA; stig 6 sambært EQF-LLL.

# 4 ECTS-áseting

180 ECTS

Eitt lestrarár við fulltíðarlestri er 60 ECTS svarandi til 1500-1800 tímar. Tá er <u>allur</u> lestraraktivitetur íroknaður, t.d. eisini próvtøkur og próvtøkufyrireiking. Hetta merkir, at arbeiðsbyrðan svarandi til 1 ECTS er 25-30 tímar.

# 5 Upptøkukrøv

Til at verða upptikin á BA í listaligum arbeiði krevst bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsprógv. Við umsóknini skulu vera skjalprógv fyri, at studenturin hevur kravdu fortreytirnar. Umsøkjarar, ið søkja á øðrum grundarlagi, mugu prógva, at teir lúka samsvarandi krøv. Er ivi um førleikarnar, kann skipast fyri upptøkuroynd.

Umframt hesar treytir er upptøka eisini treytað av, at egið arbeiði verður latið inn, sum staðfestir listaligan førleika innan annaðhvørt ritlist ella tónlist. Verður søkt um upptøku til ritlist, skulu fimm síður av egnum skrivligum avriki (prosa og/ella yrking/poesi) latast inn á føroyskum ella øðrum norðurlendskum máli. Verður søkt um upptøku til tónlist, skulu nótabløð av egnum tónleikaverki og/ella

upptøkur uppá í mesta lagi fimm minuttir latast inn. Umsøkjarar skulu harumframt lata inn eina síðu, sum í stuttum lýsir teirra listaliga profil. Fyri hvørja leið metir ein upptøkunevnd við trimum limum um innkomna tilfarið. Tey, ið verða tikin upp, verða tikin upp til aðra av leiðunum og fáa prógv í antin Ritlist ella Tónlist, men kunnu fylgja undirvísing á báðum leiðum.

# 6 Endamál við útbúgvingini

Bachelorútbúgvingin í listaligum arbeiði leggur høvuðsdentin á skapandi arbeiði innan ritlist og tónlist. Lesturin er skipaður við tí fyri eyga, at studenturin bæði lærir viðkomandi arbeiðshættir innan sína listagrein og mennir evnini at arbeiða sjálvstøðugt við egnum verkum. Harumframt nemur studenturin sær ástøðiligan kunnleika, ið letur upp sjónarhorn at hugsa greinandi um list.

Útbúgvingin er býtt sundur í tvær listaligar leiðir, ritlist og tónlist. Ein partur av námsevnunum er felags evni, og ein partur er treytaður av listaligu leiðini, sum studenturin velur. Felags fyri báðar leiðirnar er, at tveir triðingar av námsevnunum eru verkligir og ein triðingur ástøðiligur. Endamálið við hesum býtinum er, at studenturin bæði ognar sær verkligan førleika til sjálvstøðugt listaligt arbeiði og fær grundleggjandi ástøðiliga vitan til at hugsa greinandi um list og egna skapanargongd.

# 7 Lýsing av almennum og fakligum førleikum

**Talva 1 Lýsing av almennum og fakligum førleikum**

| **Almennir førleikar** | |
|---|---|
| **Nýskapan:** | duga at menna nýskapandi, eksperimenterandi hugsanir/ætlanir |
| **Sjálvstøðugt arbeiðslag:** | duga at seta sjálvstøðugt arbeiði í verk |
| **Tvørfakligur førleiki:** | megna at arbeiða tvørtur um hevdbundin mørk millum ymisk virkisøki |
| **Sjálvleiðsla:** | duga at seta sær mál og freistir og at arbeiða sjálvstøðugt í verki |
| **Framskygni:** | duga at staðfesta og lýsa avbjóðingar/skeivleikar í verkætlanum og arbeiða við loysnum |
| **Samstarvsførleiki:** | duga at arbeiða í toymum og at samstarva við onnur um at gera skapandi verkætlanir til veruleika |
| **Miðvíst arbeiðslag:** | duga at framleiða tilfar til ávísar verkætlanir og endamál |
| **Fakligir førleikar** | |
| **Felags:** | |
| **Kritiskur førleiki:** | megna at luttaka í kjaki um list, og evni til kritiskt at lýsa listalig avrik yvirhøvur |

| | |
|---|---|
| **Samskiftisførleiki:** | duga at samskifta fjølbroytt um list og um egið listaligt arbeiði |
| **Greinandi hugsan:** | førleiki at brúka abstrakta og greinandi hugsan í mun til listalig avrik og skapandi framleiðslu |
| **Metodiskt arbeiðslag:** | megna at velja og brúka ymsar arbeiðshættir innan ávísa listagrein |
| **Sjálvkritikkur:** | evni at meta um egin listalig avrik |
| **Verklig vitan:** | førleiki at brúka ástøði um list í listaligum verkætlanum |
| **Tvørfakligur førleiki:** | megna at arbeiða tvørtur um mørk millum listagreinir |
| **Skapandi íverksetan:** | evni at skapa og seta í gongd verkætlanir og loysnir í listaligum arbeiði |
| **Tónlist:** | |
| **Framleiðsla:** | duga at arbeiða við egnum tónleikaverkum frá upptøku til lidna framleiðslu. |
| **Ástøði og háttalag:** | hava førleika at uppbyggja og menna sjálvstøðugari tónlist við støði í kompositoriskum ástøði og meginreglum. |
| **Greining:** | Megna at neyvlurta, greina og kritiskt viðgera egin verk við atliti at, hvussu kompositión, formur og útseting samsvara við listaligu ætlanina hjá studentinum. |
| **Skapandi tilgongd:** | duga at brúka ymisk sløg av íblástrarkeldum sum ein virknan part av tilgongdini til tónasmíð. |
| **Ritlist:** | |
| **Ástøði og háttalag:** | duga at greiða frá ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum í t.d. yrking, prosa, týðing og skapandi skriving yvirhøvur |
| **Lesiteknisk vitan:** | duga at neyvlesa, greina og kritiskt viðgera egnan tekst við atliti at serligum eyðkennum í skriving og samsvari millum listaligar ætlanir og úrslit |
| **Skriviteknisk vitan:** | duga at greiða frá frásagnarhættum, narratologi og øðrum evnum, sum eru viðkomandi fyri skaldskapargreinir/slag |
| **Skapandi tilgongd:** | duga at brúka ymisk sløg av íblástrarkeldum sum ein virknan part av skrivitilgongdini. |

## 8 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini)

Eftir lokna útbúgving skal lesandi vera før/ur fyri at:

| |
|---|
| greiða frá hugtøkum og rákum innan ymsar ástøðiligar leiðir, og eyðmerkja veikleikar/styrkir í hesum |
| gera egnar niðurstøður um ávís ástøði |
| nýta ástøði sum amboð til at viðgera list úr ymiskum sjónarhornum |
| greiða frá ástøði og háttaløgum í viðgerð av list og greinandi viðgera tey |
| skapa og seta í verk listaligt arbeiði og framleiðslu |
| arbeiða sjálvstøðugt og leggja ætlanir fyri egnar listaligar verkætlanir |
| samskifta fjølbroytt um list |
| greiða frá egnari arbeiðsgongd og at lýsa egið arbeiðslag í listaligum arbeiði |
| taka ímóti kritikki og megna at brúka kritikk í egnum verkætlanum |
| vísa menning innan egið arbeiði og egna framleiðslu |
| brúka ástøðiliga vitan um list til at greina og arbeiða kritiskt við listaligum verkætlanum |
| loysa bundnar listaligar uppgávur til ávíst endamál, t.d. avriksmappu ella artist statements |
| greiða frá ymsum arbeiðshættum innan list og sjálvstøðugt og kritisk viðgera teir |
| greiða frá egnari arbeiðsgongd og meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum verkum |
| lýsa leiklutin, sum listin hevur í samfelagnum, frá kritiskum sjónarhornum |
| vísa á viðkomandi kjak og kritikk í nútímans listaástøði |
| arbeiða sjálvstøðugt og í kollektivum samstarvi um listaligar verkætlanir – frá hugskoti til framleiðslu |
| skapa egið listaligt íkast til eina størri listaliga heild |
| fáa sjálvstøðugt, dygdargott úrslit burtur úr listaligum arbeiði (tekstasavn/tónleikaframførsla) |
| **Serstakt fyri Tónlist skal studenturin vera førur fyri at:** |
| meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnari tónlist |
| greiða frá grundleggjandi ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum innan tónasmíð/sangskriving |
| greina egið tónasmíð við atliti at stíli og tónleikagrein |
| framleiða liðug tónleikaverk. |

| |
|---|
| skilja í millum ymsar melodiskar og harmoniskar formar og harumframt tónlistaligar formar og lýsa teir í søguligum og mentanarligum høpi. |
| **Serstakt fyri Ritlist skal studenturin vera førur fyri at:** |
| meta um listaligar styrkir og veikleikar í egnum tekstum |
| greiða frá grundleggjandi ástøðiligum hugsanum og arbeiðshættum innan ritlist |
| viðgera egnan skrivihátt við atliti at stíli, tekstslagi og móttakara |
| brúka og meta um ymisk sløg av teksti og og stíli, og duga at brúka viðkomandi greiningaramboð |
| greiða frá ymsum frásagnarhættum og velja og brúka teir til ávíst endamál |

# 9 Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti:

## 9.1 Bygnaður

Útbúgvingin er sett saman av skeiðum, har tey lesandi partvís fylgja einum føstum lestrarlista og partvís arbeiða við egnum verkum. Áherðsla verður løgd á grundleggjandi vitan um list og listaligt arbeiði bæði ástøðiliga og verkliga. Frá byrjan verður arbeitt stigvíst við at menna førleikarnar at brúka ástøðiliga vitan í sjálvstøðugum listaligum arbeiði.

Tað eyðkennir útbúgvingina, at ástøði og verkligar royndir hanga saman. Í verkliga partinum verður lagt upp til verkætlanir, sum ganga tvørtur um hevdbundin mørk millum listagreinir. Tey, ið fáast við bæði ritlist og tónlist, hava í hesum sambandi møguleika at fylgja undirvísingini á báðum leiðum.

Fyrsta lestrarhálva er skipað í trý skeið, har tvey umboða verkliga partin av útbúgvingini, og eitt umboðar ástøðiliga partin. Helvtin av verkligu undirvísingini fer fram í verkstovum, sum hava til endamáls at menna fakligu førleikarnar hjá teimum lesandi. Hin helvtin er egið arbeiði, har dentur verður lagdur á sjálvstøðuga skapanargongd. Eitt felagsskeið um almenna fagurfrøði myndar ástøðiliga triðingin av lestrarhálvuni.

Onnur og triðja lestrarhálva eru skipaðar eftir sama grundleggjandi leisti. Í verkstovunum verða nýggir arbeiðshættir royndir og viðgjørdir, meðan egna arbeiðið er beinleiðis framhald av arbeiðinum frá fyrstu lestrarhálvu. Í ástøðiliga partinum eru felagsskeið og serlig skeið fyri báðar leiðirnar.

Fjórða lestrarhálvan víkir frá fyrru lestrarhálvunum við tað, at listaliga arbeiðið í størri mun er grundað á listaligt samstarv millum studentarnar. Í staðin fyri verkstovur og egið arbeiði kemur eitt skeið í listaligum arbeiði, har studentarnir fáa eina felags uppgávu at loysa. Í ritlist fáa studentarnir til uppgávu at gera eitt tekstasavn við egnum tekstum. Í tónlist fáa studentarnir til uppgávu at gera eina tónleikaútgávu við egnum tónleikaverkum.

Fimtu lestrarhálvuna er møguligt at vera skiftislesandi á einum av útbúgvingarstovnunum uttanlands, sum útbúgvingin í listaligum arbeiði hevur avtalu við. Eisini er møguligt at fara í starvslæru í Føroyum ella uttanlands.

Sættu og seinastu lestrarhálvuna gera studentarnir endaliga verkætlan og ritgerð. Verkætlanin fevnir um tveir triðingar av arbeiðsbyrðuni fyri skeiðið, og er eitt sjálvstøðugt ritlista- ella tónlistaverk. Ritgerðin fevnir um ein triðing av arbeiðsbyrðuni fyri skeiðið, og er ein ástøðilig og refleksiv viðgerð av listaligu verkætlanini.

**Talva 2 Raðfylgjan í útbúgvingini**

| Lestrar-hálva | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Verkstova 1<br><br>10 ECTS | Egið arbeiði 1<br><br>10 ECTS | Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS |
| | | | |
| 2. | Verkstova 2<br><br>10 ECTS | Egið arbeiði 2<br><br>10 ECTS | Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS |
| | | | |
| 3. | Verkstova 3<br><br>10 ECTS | Egið arbeiði 3<br><br>10 ECTS | Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS |
| | | | |
| 4. | Listaligt arbeiði<br><br>20 ECTS | | Ástøðiligt skeið<br>(skiftandi evni)<br>10 ECTS |
| | | | |
| 5. | Skiftislestur / starvslæra<br><br>30 ECTS | | |
| | | | |
| 6. | Endalig verkætlan og ritgerð<br><br>30 ECTS | | |
| Samlað ECTS | 180 | | |

## 9.2 Innihald

Evnisøkið er skapandi listaligt arbeiði. Verkliga verður dentur lagdur á arbeiði í verkstovum bæði innan ta listagrein, sum studenturin hevur valt, og millum ymsar listagreinir. Ástøðiliga verður dentur lagdur á vitan um list í fagurfrøðiligum og bókmenta- ella tónleikafrøðiligum høpi.

Í verkstovunum á tónlistaleiðini verður undirvíst í t.d. tónalæru, harmoni, nótalæru, kompositión, útseting, tónleikatøkni og øðrum viðkomandi evnum. Á ritlistaleiðini verður undirvíst í at skriva prosa og yrking/poesi, í frásagnarhættum, neyvlesing og tekstasløgum, umframt í øðrum evnum, sum eru viðkomandi fyri skaldskapargreinina/slagið, ið studentarnir arbeiða við.

Egna arbeiðið gevur teimum lesandi høvi at menna ein sjálvstøðugan listaligan samleika. Bólka- og einstaklingaundirvísing eru karmur um viðgerð og kjak av verkum hjá teimum lesandi. Sum lesandi mennir tú eginleikan at fyrihalda teg kritiskt til egin listalig avrik og at geva øðrum grundaðan kritikk.

Ástøðiligi parturin fevnir um fyrilestrar og námsskeið í t.d. fagurfrøði, bókmentasøgu, bókmentafrøði, tónleikasøgu og tónleikafrøði. Sum lesandi fært tú innlit í siðvenjur, sum mynda tína yrkisgrein, og lærir um ástøði, sum geva tær førleika at greina list úr skiftandi sjónarhornum.

Endaliga verkætlanin og ritgerðin skulu skjalprógva førleikan hjá studentinum bæði at útinna listaligt arbeiði og at viðgera list og egna skapanargongd við refleksivari frásjón. Úrslitið av verkætlanini er egið tónleika- ella bókmentaverk, meðan ritgerðin viðger verkið og skapanargongdina úr einum ástøðiligum sjónarhorni.

## 9.3 Arbeiðsbyrða og lestrarevni

### 9.3.1 ECTS (European Credit Transfer System)

ECTS er ein roknieind fyri støddina og arbeiðsbyrðuna á náminum. Eitt námsár (fulltíðarnám) svarar til 60 ECTS, og lærugreinir, lestrarevni og ritgerðir fáa tillutað so mong ECTS, sum arbeiðsbyrðan svarar til í fulltíðarnámi. Eitt ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar (sí eisini pkt. 4).

### 9.3.2 Allýsing av lestrarevnum

Eitt lestrarevni, sum er 10 ECTS, svarar til undirvísing í umleið 45 tímar.

Lestrarevnini eru verklig, ástøðilig ella samansett. Tilfarið, ið lesast skal í einum lestrarevni, er vanliga av fýra sløgum:

- alment ástøði og háttaløg
- serbókmentir/sertilfar
- grundtekstir
- egnir tekstir/løg/tónleikur/ljóðdømi

Í tí fyrsta bólkinum eru fyrst og fremst samanhangandi verk um ástøði og háttaløg, men greinir og greinasøvn koma eisini upp á tal. Annar bólkurin er eitt úrval av serbókmentum við greiningum, viðgerðum o.tíl., eitt nú greinir og partar av størri verkum. Nøgd og slag kann skifta eftir lestrarevni,

serliga tá ið tað ræður um tann seinasta bólkin, grundtekstir. Grundtekstir í ritlistaligum lestrarevnum eru yrkingar, stuttsøgur, skaldsøgur, poetikkir, týðingar, ástøðilig ella søgulig verk o.a., alt eftir hvat lestrarevni tað snýr seg um; grundtekstir í tónlistaligum lestrarevnum eru nótabløð, tónleikaútgávur o.a.

### 9.3.3 Sjálvlestur

Studenturin kann sjálv/ur seta sær eitt lestrarevni saman. Sjálvlestrarevnið skal vera 10 ECTS. Loyvt er bert at gera 1 sjálvlestrarevni í BA-lestrinum. Útbúgvingarleiðarin skal móttaka og góðkenna evnislýsingina, ECTS og leiðbeinara við freist 1. oktober/1. mars .

Lestrarlisti í sjálvlestrarevnum skal í vavi og samanseting samsvara við lestrarlistar til vanlig lestrarevni á BA. Í sjálvlestrarevnum verða uppgivin 3 vísindaverk og 4 bókmentaverk.

Leiðbeinarin skal góðkenna lestrarlistan undan próvtøkuni.

Próvtøkan kann ikki vera frí heimauppgáva, men má vera bundin heimauppgáva, munnlig ella skrivlig próvtøka.

Tó kunnu undirvísarar eisini søkja um at royna nýggjar próvtøkuhættir, sum ikki eru lýstir í námsskipanini. Í slíkum førum skal undirvísarin leggja eina skrivliga umsókn við grundgevingum fyri útbúgvingarleiðaran.
Avgerðin hjá útbúgvingarleiðaranum skal síðani staðfestast í Lestrarráðnum. Eftir skeiðslok og próvtøku skal undirvísarin senda Lestrarráðnum eina eftirmeting.

### 9.3.4 Lestrarlistar

Í lestrarevnum, ið telja 10 ECTS, verða uppgivnar uml. 500 síður.

Tó kann býtið millum tey fýra tilfarssløgini, alment ástøði, serbókmentir/sertilfar, grundtekstir og egnir tekstir/løg/tónleikur/ljóðfílur, skifta frá einum lestrarevni til annað. Í summum kann meginparturin vera innan ástøði, háttalag og viðgerð av ávísum evnum; í øðrum kann høvuðsdentur liggja á egnari framleiðslu. Krøvini verða ásett í hvørjum føri.

Lestrarevni av aðrari stødd verða roknað samsvarandi hesum.

Ávísar hálvur kunnu studentarnir fáa til uppgávu at lata inn ein sjálvlestrarlista við 5 verkum til egnan lestur. Á tónlistaleiðini kunnu tað vera verk um tónleik ella/og tónleikaverk, sum studentarnir lurta eftir. Sjálvlestrarlistarnar leggjast afturat tilfarinum, sum vísast kann til undir próvhoyringini í verkstovu og egnum arbeiði.

## 9.4 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini

Undirvísingarformurin kann vera: fyrilestrar, meistaralæra, studentaframløgur, venjingar og uppgávur, orðaskifti í bólkum og flokki, seminar, einsæris leiðbeining og mentorsamrøður.

Undirvísingin er grundað á granskingarvirksemið hjá undirvísarunum, sum eru granskarar á Føroyamálsdeildini, og/ella listaliga virksemið hjá undirvísarunum, ið eru yrkislistafólk við avrikum og royndum, sum geva førleika at undirvísa í listaligum arbeiði á universitetsstigi.

### 9.4.1 Mentorskipan

Mentorskipanin hevur til endamáls at stuðla og menna studentin í arbeiðinum við egnari rit- og tónlist. Studenturin velur í samráð við útbúgvingarleiðaran ein mentor, og saman leggja mentorur og studentur leistin fyri samstarvið. Mentorskipanin gevur studentinum møguleika fyri minst trimum samrøðum á 2 tímar við mentorin uttan fyri vanligu undirvísingina í eina lestrarhálvu. Í samráð við studentin ger mentorurin eina ætlan fyri lestrarhálvuna, og samrøðurnar býtast javnt yvir lestrarhálvuna. Studentar á Tónlistaleiðini hava møguleika at velja millum at leggja mentortímarnar til rættis eftir hesum leistinum ella at gera avtalu um stutt serskeið í t.d. sangi ella ljóðførislæru.

## 9.5 Starvsvenjing

Í fimtu lestrarhálvu hevur studenturin møguleika fyri at fara í starvslæru annaðhvørt í Føroyum ella uttanlands (t.d. á lista- og mentanarstovnum, tónleikahúsum, miðlum, forløgum og líknandi).

Studentar, ið ynskja at fara í starvslæru, seta seg í samband við møgulig starvslærupláss og gera avtalu við hesi. Í avtaluni skulu arbeiðsuppgávur og endamál við starvslæruni lýsast væl, og tað skal vera greitt í avtaluni, á hvønn hátt starvslæruplássið er viðkomandi fyri listaliga arbeiðið hjá studentinum. Útbúgvingarleiðarin skal góðkenna avtaluna við starvslæruplássið.

Tá starvslæran er av, skal studenturin lata inn eina skrivliga frágreiðing á 10-15 síður. Frágreiðingin skal umfata eina stutta lýsing av stovninum, ið starvslæran hevur verið knýtt at við serligum denti á fakliga innihaldið og av arbeiðsprosessum og arbeiðsuppgávum í starvslæruni. Í frágreiðingini skal studenturin vísa á samanhang millum starvslæruna og fakligu førleikarnar, sum studenturin hevur fingið undir útbúgvingini. Frágreiðingin skal eisini umfata eina meting av, hvussu starvslæran hevur verið við til at styrkja og menna hesar førleikar.

Ein lestrarhálva í starvslæru saman við skrivligari frágreiðing telur 30 ECTS.

## 9.6 Endalig verkætlan og ritgerðir

Útbúgvingin í listaligum arbeiði endar við eini verkætlan og tilhoyrandi ritgerð, ið samanlagt telja 30 ECTS. Úrslitið av verkætlanini er eitt egið ritlista- ella tónlistaverk, sum svarar til endamál og læruúrtøkur

fyri skeiðið og sostatt kann verða góðkent sum fráfaringarverk. Verkætlanin verður løgd til rættis í samráð við vegleiðara, ið eisini vegleiðir arbeiðið, meðan verkætlanin fer fram. Saman við ritgerðini skal verkætlanin skjalprógva førleikan hjá studentinum bæði at útinna listaligt arbeiði, ið svarar til ásettu læruúrtøkurnar, og at hugsa við refleksivari frásjón um list og egna skapanargongd. Verkætlanir í Ritlist skulu vera 30-50 síður til longdar, ikki íroknað ritgerðina. Verkætlanir í Tónlist skulu vera 15-20 minuttir til longdar.

Ritgerðin verður latin inn saman við verkætlanini og er 10-15 síður til longdar. Ritgerðin skal skrivast sum ein ritroynd við ástøðiligari frásjón, har studenturin fær høvi at hugleiða um arbeiðsgongdina við endaligu verkætlanini og verkið, sum spyrst burturúr. Ritgerðin eigur at prógva evnini hjá studentinum at viðgera og nýta vísindaligt ástøði og háttalag. Studenturin velur evnið í samráð við vegleiðara, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.

### 9.6.1 Innlating av endaligari verkætlan og ritgerð og møguligar seinkingar

Endaliga verkætlanin og ritgerðin verða gjørdar í 6. lestrarhálvu og latnar inn við endan á hálvuni. Um studenturin ikki letur verkætlanina og ritgerðina inn til tíðina, kunnu heitini snarast, og studenturin fær 2 mánaðir afturat til verkætlanina og ritgerðina. Um hann heldur ikki letur inn tá, kunnu heitini snarast eina ferð afturat, og studenturin fær 2 mánaðir afturat. Um hann heldur ikki letur inn tá, hevur hann brúkt allar tríggjar møguleikarnar. Serlig avtala má tá gerast við útbúgvingarleiðaran. Um studenturin ikki letur inn tá, kann hann søkja um loyvi at lata inn seinni. Hann kann søkja um loyvi at viðgera sama evni, sum hann møguliga hevur fingið staðfest. Um nevndu mannagongdir og freistir ikki verða hildnar, verður studenturin útskrivaður uttan endaligt prógv.

## 9.7 Skráseting

### 9.7.1 Innskriving

Tá studentur er upptikin á Útbúgvingina í listaligum arbeiði, verður hann biðin um at útfylla innskrivingarblað til lestur og próvtøkur. Til stakskeið er studenturin innskrivaður ta hálvu, skeiðið verður lisið. Innskriving til próvtøku er sjálvvirkin. Tó skulu tey, ið hava víðkað lestrarevni, og tey, sum taka sjálvlestrarevni, skriva seg inn til próvtøku innan freistirnar 1. oktober/1. mars. Tað ber ikki til at taka seg aftur frá próvtøku, og studenturin má bíða til næstu regluligu próvtøkur eru, um hann ikki fer til próvtøku, tá regluliga próvtøkan verður hildin – sí tó ásetingar um sjúku.

### 9.7.2 Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru studentar, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum av ástøðiligu skeiðunum á útbúgvingini, uttan at vera innskrivaðir til fullan lestur. Verkligu skeiðini verða vanliga ikki boðin út til stakgreinalestur. Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt ástøðiligt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum aðrir studentar. Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á

skeiðinum. Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting. Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði. Fulltíðarlesandi á Setrinum kunnu taka stakskeið á øðrum útbúgvingum á Setrinum uttan at gjalda.

#### 9.7.3 Avriksflutningur av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum

Treytin fyri at studentur tekur part/ar av náminum uttanlands og/ella á øðrum deildum Setursins er, at studenturin leggur lesturin til rættis og ger avtalu um hann við ta universitetsdeild, hann ætlar at vitja. Ætlanin skal leggjast fyri útbúgvingarleiðaran frammanundan til fyribils góðkenningar fyri at tryggja, at tað ber til at avriksflyta lesturin.

Studentar, ið koma við prógvi frá øðrum lærustovni ella øðrum deildum á Setrinum, og sum ynskja at fáa lærugreinir avriksfluttar, skulu søkja fyri 15. februar/15. september.

#### 9.7.4 Lokin skeið eftir eldri námsskipanum

Skeið, ið eru lokin á Útbúgvingini í listaligum arbeiði eftir eldri námsskipanum, kunnu góðskrivast til galdandi lestur eftir umbøn. Avtala skal gerast um tað við útbúgvingarleiðaran, og lestrarráðið skal endaliga góðkenna góðskrivingarnar.

#### 9.7.5 At skifta leið

Studentur, sum vil skifta leið á Útbúgvingini í listaligum arbeiði (frá Ritlist til Tónlist ella frá Tónlist til Ritlist), skal senda umsókn til útbúgvingarleiðaran saman við dømi um egið listaligt avrik. Útbúgvingarleiðarin sendir viðkomandi undirvísarum á leiðini, sum studenturin vil skifta til, listaliga avrikið, og ráðførir seg við tey, áðrenn avgerð verður tikin. Dekanurin staðfestir avgerðina. Tað ber einans til at skifta leið fyrsta árið í lestrinum.

### 9.8 Próvtøkur

#### 9.8.1 Almennar reglur um próvtøkur

Studentur verður innskrivaður til allar próvtøkur, sum eru kravdur partur av útbúgvingini.

Próvtøka er í hvørji lærugrein sær. “Staðið” ella “2” eftir 7-talsstiganum krevst fyri at standa hana. Summar próvtøkur eru skipaðar sum “uttanhýsispróvtøkur”, og tá verður avrikið dømt saman við próvdómara frá øðrum lærustovni, og próvtal verður givið. Aðrar próvtøkur eru skipaðar sum “innanhýsispróvtøkur”, og tá dømir undirvísarin í lærugreinini saman við øðrum undirvísara/undirvísarum á deildini ella Fróðskaparsetrinum avrikið sum “staðið” ella “ikki staðið”.

Í summum førum ber til at sleppa undan próvtøku, um studenturin møtir til 80% av tímunum í lærugreinini og er virkin í tímunum - sí í slíkum førum skeiðslýsing.

Við próvtøku skal studenturin prógva, at hann hevur ognað sær nøktandi fakligt innlit í tær einstøku lærugreinirnar samsvarandi læruúrtøkunum fyri skeiðið. Próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann próvtøkumálið vera annað norðurlendskt mál, um undirvísarin ella próvdómarin ikki skilur føroyskt. Fyri skiftisstudentar eru aðrar reglur galdandi.

### 9.8.2 Rættstundis innlating

Avriksmappur, heimauppgávur og aðrar innlatingar í sambandi við próvtøku skulu latast inn rættstundis. Avrik, ið verða latin inn eftir at innlatingarfreistin er farin, verða ikki próvdømd.

### 9.8.3 Verk, tekstir og blaðsíður

Í lestrarlistunum eru krøv sett viðvíkjandi verkum, tekstum og blaðsíðum.

Eitt **verk** er ein heild, t.d. eitt yrkingasavn, stuttsøgusavn, ritroyndar-/essay-savn, skaldsøga, leikrit, ella verk frá øðrum miðlum, sum kunnu sammetast við hesi. Tað kann eisini vera eitt tekstasavn ella savn við ljóðupptøkum/tónleiki, sum studenturin sjálvur setur saman, og sum í minsta lagi er 100 síður til støddar (ella samsvarandi tilfar við bæði teksti og ljóðupptøkum).

**Stuttir tekstir** eru stakar yrkingar, stuttsøgur, ritroyndir/essay, greinir, hugleiðingar, kvæðir, løg og vísur. **Tekstir** eru eisini brøv, samrøður, lýsingar, myndir, upptøkur o.tíl.

Eitt **vísindaligt verk** er ein vísindalig ritgerð, 80-100 síður ella meira. Studenturin kann sjálvur seta eitt vísindaligt verk saman av greinum og stuttum ritgerðum. Tað skal í minsta lagi vera 100 síður til støddar. Roknað verður við **miðalblaðsíðum**, sum eru um 2.400 eindir hvør.

### 9.8.4 Heimauppgávur

Til summar próvtøkur – serliga í ástøðiligu skeiðunum – skal studenturin skriva eina heimauppgávu, sum hevur samband við undirvísingina, í staðin fyri at fara til skrivliga ella munnliga próvtøku. Tvey sløg av heimauppgávum eru: uppgáva við uppgivnum evni (bundin heimauppgáva) ella uppgáva við sjálvvaldum evni (frí heimauppgáva).

*Frí heimauppgáva*: Tá er próvtøkan heimauppgáva um eitt sjálvvalt evni. Treytin fyri at studenturin sleppur at skriva fría heimauppgávu er, at hann virkin hevur fylgt undirvísingini; eitt nú skal hann í minsta lagi hava verið í 80% av tímunum. Undirvísarin skal góðkenna evnið til ta fríu heimauppgávuna, og uppgávan skal vera innlatin ásettan dag.

*Bundin heimauppgáva*: Til uppgávu um eitt uppgivið evni orðar undirvísarin spurningin, og alt eftir hvørjum stigi teir lesa á, er vegleiðandi longdin á uppgávunum hendan:

Heimauppgáva, sum telur 10 ECTS, skal vera uml. 10-15 síður á BA-stigi.

Roknað verður við miðalsíðum við uml. 2.400 eindum (bókstøvum, teknum og millumrúmum íroknaðum), tað er t.d. Times New Roman 12 pkt., breddin vinstru- og høgrumegin 3 cm, í erva og í neðra

2,5 cm, hálvtannað regluglopp. Við í síðutalið telja uppgávutekstur og notur, ikki perma, innihaldsyvirlit, bókmentalisti og fylgiskjøl.

Aftast í heimauppgávunum skal vera bókmentalisti.

### 9.8.5 Bólka- og einstaklingsuppgávur

Tað ber til at skriva heimauppgávur einsamallur/einsamøll ella í bólki. Í mesta lagi tríggir studentar kunnu skriva uppgávu saman. Til støddar skulu uppgávur skrivaðar í bólki vera so mangar ferðir fleiri blaðsíður enn einstaklingsuppgávurnar, sum studentar eru í bólkinum. Studentarnir skulu skila til, hvat hvør hevur skrivað og hevur ábyrgdina av í uppgávuni og lata uppgávuna døma eftir tí, soleiðis at hvør studentur fær sítt próvtal.

### 9.8.6 Egið avrik

Í skeiðunum Egið arbeiði og Verkstova kunnu egin listalig avrik hjá studentinum vera partur av próvtøkutilfarinum, og hesi verða tá mótroknað talinum av uppgivnum síðum.

## 9.9 Próvtøkuhættir

Í hvørji lærugrein sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Sí einstøku skeiðslýsingarnar.

### 9.9.1 Munnlig og skrivlig próvtøka

*Galdandi fyri lestrarevni, ið telja 10 ECTS:*

1. Munnlig próvtøka í 30 minuttir (við 30 minuttum í fyrireikingartíð)
2. Skrivlig próvtøka í 6 tímar
3. Samansett. Sjálvvalt egið avrik + munnlig framløga
4. Samansett. Bundin heimauppgáva + munnlig framløga
5. Samansett. Ávíst dagatal, 1-3 dagar, at fyrireika framløgu til hálvtíma munnliga próvtøku um uppgivið evni

### 9.9.2 Heimauppgávur

1. Heimauppgáva (tvær vikur) um eitt uppgivið evni
2. Heimauppgáva (ein vika). Fyrireiking til munnliga framløgu um uppgivið evni
3. Heimauppgáva um sjálvvalt evni, ið hevur samband við undirvísingina. Undirvísarin skal góðkenna evnið. Treytin fyri at skriva fría heimauppgávu er, at studenturin hevur verið virkin í undirvísingini Um stødd: sí Heimauppgávur.

### 9.9.3 Avriksmappa

Avriksmappan endurspeglar eina arbeiðsgongd, og próvtøkan tekur sostatt støði í tí arbeiði, sum studenturin hevur avrikað í eina undirvísingarhálvu.

1. Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda
2. Samansett próvtøka. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu, ið verður latin inn áðrenn próvtøkuna

### 9.9.4 Verklig próvtøka

Verklig próvtøka. Sýning/framførsla av verki + samrøða við próvdómarar. Studenturin sýnir/framførir egið verk (10-12 minuttir til longdar) sambært verkætlan, sum er góðkend av skeiðsábyrgdara, og greiðir í samrøðu við próvdómarar greinandi frá verkinum.

Í hvørjum skeiði sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Undirvísarin kann eisini søkja um at royna nýggjar próvtøkuhættir, sum ikki eru lýstir í námsskipanini. Í slíkum førum skal Undirvísarin, áðrenn skeiðið verður lýst, leggja eina skrivliga umsókn við grundgevingum fyri útbúgvingarleiðaran. Avgerðin hjá útbúgvingarleiðaranum skal síðani staðfestast í lestrarráðnum. Eftir skeiðslok og próvtøku skal undirvísarin senda lestrarráðnum eina eftirmeting.

## 9.10 Próvreglur

### 9.10.1 Próvtøka

Øll skeið enda við próvtøku. Studentur, sum ikki møtir, er fallin. Tey, sum ætla sær til próvtøku í lærugreinunum í listaligum arbeiði, skulu:

- vera innskrivað á Fróðskaparsetrinum til nám í listaligum arbeiði á Føroyamálsdeildini
- hava møtt regluliga til undirvísing
- til munnliga og skrivliga próvtøku: møta rættstundis próvtøkudagin, t.e. **í seinasta lagi 15 minuttir** fyri próvtøkubyrjan
- til bundna heimauppgávu: kvitta fyri móttøku av uppgávuevni og lata svarið innaftur ásetta tíð
- til fría heimauppgávu: lata inn uppgávu í seinasta lagi ásettan dag og tíð.

Bundnar og fríar heimauppgávur skulu latast inn talgilt. Tá innlatið er, uttan at freistin er farin, ber ikki til at lata inn av nýggjum (við broytingum/rættingum).

Ritgerðir skulu latast inn talgilt. Endaligar verkætlanir í ritlist og nótabløð til endaligar verkætlanir í tónlist skulu latast inn talgilt. Upptøkur av endaligum verkætlanum í tónlist skulu latast inn talgilt.

Tá studentar skulu gera endaliga verkætlan og ritgerð, skulu teir avtala eitt evni við ein leiðbeinara, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.

### 9.10.2 Sjúka

Um sjúka forðar studenti í at fara til próvtøku skal hann **í seinasta lagi, tá próvtøkan byrjar**, boða deildini frá, at hann er sjúkur. **Harumframt** skal hann lata deildini **sjúkuváttan**:

a. við munnliga og skrivliga próvtøku: í seinasta lagi 8 dagar seinni
b. við bundna heimauppgávu: í seinasta lagi 8 dagar seinni
c. við fría heimauppgávu: í seinasta lagi innlatingardagin

## 9.11 Próvtøkuhald

### 9.11.1 Møting

Skrivlig próvtøka byrjar vanliga kl. 9.00.

Studentarnir eiga at koma í seinasta lagi 15 minuttir frammanundan, men best er at koma í góðari tíð, serliga um telda skal setast upp.

Støða verður í hvørjum einstøkum føri tikin til, um ein studentur, ið møtir eftir at próvtøkan er byrjað, kann sleppa inn. Er nakar av teimum, ið eru til próvtøku, farin út úr próvtøkuhølinum, aftan á at uppgávurnar eru útflýggjaðar, er ikki møguligt at koma inn, uttan so at hin útfarni hevur verið undir støðugum eftirliti. Heldur ikki tann, ið kemur seinni enn 1 tíma eftir byrjan, sleppur inn. Tann, ið kemur ov seint, fær ikki lagt afturat tíðini fyri tað, sum mist er.

### 9.11.2 Hjálparamboð

Í skeiðslýsingunum fyri hvørt skeið sær verður vanliga sagt frá, hvørji hjálparamboð loyvt er at hava við sær til próvtøkuna, og kunngerð um tað skal eisini vera sligin upp uttan fyri próvtøkuhølini. Studentarnir mugu sjálvir kunna seg um hesi viðurskifti og hava við sær loyvdu amboðini. Loyvt er ikki við próvtøkuna at læna frá øðrum enn próvtøkueftirlitinum.

Studentarnir hava skyldu til at lata frá sær til próvtøkueftirlitið øll amboð o.tíl., ið ikki eru loyvd og sum tey hava við sær inn í próvtøkuhølini, íroknað fartelefonir. Annars kunnu teir verða burturvístir.

### 9.11.3 Sjúka við próvtøkuhaldið

Um ein gerst sjúkur við próvtøkuna, kann verða boðað frá til eftirlitið, ið kann fylgja viðkomandi útum eitt stutt bil.

Verður hin sjúki noyddur at gevast við próvtøkuni, skal uppgávan við avrikum latast inn og kann fáa átekning eftirlitsins um, at viðkomandi er givin fyri sjúku. Vil hin sjúki sleppa til sjúkraprótøku, skal læknaváttan verða latin deildini í seinasta lagi 8 dagar eftir próvtøkudagin.

### 9.11.4 Um at fara frá próvtøku

Fer ein úr próvtøkuhølinum av eini av hesum orsøkum:

a) studenturin vil ikki svara uppgávuni
b) studenturin er liðugur at svara uppgávuni, áðrenn tíðin er farin
c) aðrar próvtøkur fara fram samstundis í sama høli, ið vara longri enn eins egna

má hann fara úr hølinum uttan at órógva.

Samleikateigarnir á svartilfarinum skulu vera fyltir út, áðrenn ein fer úr hølinum, og um studenturin hevur skrivað á teldu, skal hann undirskriva seinasta arkið.

Studenturin kann bara sleppa úr hølinum tann fyrsta tíman, um allir studentarnir eru møttir. Eingin studentur má fara frá borðinum uttan at boða eftirlitinum frá og lata frá sær uppgávusvørini - ella í minsta lagi umslagið við teigunum útfyltum.

### 9.11.5 Próvtøkutíðin lokin

Tá svartíðin er farin, savnar próvtøkueftirlitið uppgávusvarini, og studentarnir eiga at steðga á, til alt tilfarið er innlatið. Er nakar farin út úr hølinum við uppgávusvarunum, verður tilfarið ikki próvdømt, men hetta telur kortini sum ein próvtøka.

### 9.11.6 Próvtøkuúrslit

Úrslitið av próvtøkuni verður vanliga kunngjørt beint eftir lidna próvdøming. Aðalreglan er, at próvtøkur skulu vera próvdømdar innan ein mánað. Undantiknar hesi reglu er endaliga verkætlanin, sum skal vera próvdømd innan 8 vikur.

### 9.11.7 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini

**Talva 3 Raðfylgjan av próvtøkum.**

Kunningin um próvtøkuhátt er leiðbeinandi. Broytingar kunnu koma fyri.

| Lestrarhálva | Skeið | Próvtøka | Dømd | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Verkstova 1 | Samansett. Bundin heimauppgáva + munnlig framløga | Innanhýsis | Staðið/ikki staðið | 10 |
| | Egið arbeiði 1 | Samansett. Sjálvvalt egið verk + munnlig framløga | Innanhýsis | Staðið/ikki staðið | 10 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ástøðiligt skeið 1 | Skiftandi próvtøkuháttur | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| 2. | Verkstova 2 | Samansett. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| | Egið arbeiði 2 | Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| | Ástøðiligt skeið 2 | Skiftandi próvtøkuháttur | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| 3. | Verkstova 3 | Samansett. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| | Egið arbeiði 3 | Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| | Ástøðiligt skeið 3 | Skiftandi próvtøkuháttur | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| 4. | Listaligt arbeiði | Samansett. Munnlig próvtøka við støði í avriksmappu | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 20 |
| | Ástøðiligt skeið 4 | Skiftandi próvtøkuháttur | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| 5. | Skiftislestur / Starvslæra | Í samráð við viðkomandi útbúgvingarstovn/lærupláss | | | 30 |
| 6. | Endalig verkætlan og ritgerð | Avriksmappa verður latin inn við skeiðsenda | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 30 |

### 9.11.8 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming

Í minsta lagi 1/3 av próvtøkunum, roknað í ECTS-stigum, skulu próvdømast av uttanhýsis próvdómara. Hetta er undantikið starvsvenjing.

9.11.9 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið

Í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (roknað í ECTS-stigum) kunnu verða dømdar staðið/ikki staðið. Hetta er undantikið starvsvenjing, umframt tá talan er um avriksflutning. Restin av próvtøkunum skulu vera dømdar eftir galdandi próvtalastiga, ið er 7-talsstigin.

| 7-tals stigin | Próvtalsmerking | Próvtalslýsing |
|---|---|---|
| 12 | Lýtaleyst ella mest sum avrik | Verður givið fyri avrik, sum er lýtaleyst ella mest sum lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 10 | Sera gott avrik | Verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 7 | Gott avrik | Verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 4 | Hampiligt avrik | Verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini. |
| 2 | Toliligt avrik | Verður givið fyri toliligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| 0 | Ikki nøktandi avrik | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini. |
| -3 | Heilt vánaligt avrik | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. Studenturin hevur staðið, tá ið hann fær 02, 4, 7, 10 ella 12. |

9.11.10 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Skipað verður fyri endurpróvtøku seinast 3 mánaðir eftir regluligu próvtøkuna.

Studentur kann í mesta lagi fara tríggjar ferðir til somu próvtøku. Útbúgvingarleiðarin kann tó eftir skrivligari umsókn loyva studentinum at fara til próvtøku í sama skeiði fjórðu ferð, um serligar umstøður tala fyri tí. Umsókn um undantaksloyvi skal vera latin deildini í seinasta lagi 2 vikur, eftir at studenturin hevur fingið boðini um, at hann er fallin triðju ferð.

Studentur, ið fer til endurpróvtøku, skal svara eini aðrari uppgávuorðing enn til upprunaligu próvtøkuna. Um talan t.d. er um skrivliga próvtøku, fær studenturin ein nýggjan próvtøkuspurning. Um talan er um próvtøku við støði í avriksmappu, skal innihaldið í avriksmappuni vera eitt annað enn til upprunaligu próvtøkuna.

Rætturin til endurpróvtøku er treytaður av, at møtt verður til regluligu próvtøkuna. Studentur hevur ikki rætt til endurpróvtøku, um hann ikki hevur møtt til regluliga próvtøku, tó er sjúka undantak. Tá talan er um sjúku, er rætturin til endurpróvtøku treytaður av, at sjúkraváttanin er latin deildarskrivstovuni rættstundis.

## 9.12 Undirvísingarmál

Útbúgvingin fylgir galdandi málpolitikki á Setrinum. Meginreglan í málpolitikkinum hjá Fróðskaparsetrinum er, at skrivaða og talaða málið á Setrinum er føroyskt, bæði í undirvísing, gransking og fyrisiting, men at serligar umstøður onkuntíð krevja undantøk frá meginregluni. Til dømis kann tað vera neyðugt at skipa fyri undirvísing á øðrum norðurlendskum máli ella enskum, tá gestaundirvísari og gestalesandi vitja útbúgvingina.

## 9.13 Farloyvi

Studentur, sum hevur lisið í minsta lagi 1 ár á útbúgvingini, svarandi til 60 ECTS, kann søkja um farloyvi. Skrivlig umsókn skal sendast útbúgvingarleiðaranum. Verður farloyvi játtað, verður avtala gjørd við útbúgvingarleiðaran um treytir, og nær studenturin kann byrja aftur. Víst verður eisini til kunngerð um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya (sí heimasíðu Setursins).

## 9.14 Altjóða útbúgvingarmøguleikar

Útbúgvingin hevur avtalur um skiftislestur við aðrar útbúgvingarstovnar í Íslandi, Danmark, Noregi og Svøríki. Nærri kunning um mannagongdir, umsóknarfreistir o.a. og fæst við at venda sær til útbúgvingarleiðaran.

## 9.15 Luttøkuskylda

At taka Bachelor í listaligum arbeiði er fulltíðarstarv, og ein treyt fyri at sleppa til próvtøku er, at studenturin møtir regluliga til undirvísing. Væntað verður, at studenturin er fyrireikaður til undirvísing, luttekur í kjaki og framløgum og tekur ábyrgd fyri egnari læring og menning.

## 9.16 Lestrarvirkni

Fyri at vera skrásett/ur sum lestrarvirkin krevst, at studenturin møtir regluliga til undirvísing og próvtøkur. Harafturat krevst, at tað ongantíð eru meira enn 60 ECTS á muni millum próvtøkurnar, ið studenturin hevur staðið, og próvtøkurnar, sum studenturin sambært námsskipanini átti at havt staðið síðan lestrarbyrjan.

### 9.16.1 Lestrarvirkni og lestrarstuðul

Gevið gætur at lesandi, sum fáa stuðul frá Studna, skulu beinanvegin boða Studna frá, tá ið tey gevast at lesa. Ov nógv útgoldin stuðul verður kravdur inn aftur beinanvegin. Tað er ábyrgdin hjá tí lesandi, at Studni fær fráboðanina.

Um lesandi eru meira enn 1 ár (60 ECTS) afturúr í lesnaðinum, verður lestrarstuðulin steðgaður. Um lesandi gerast lestrarvirkin aftur, tvs. eru minni enn 1 ár afturúr lesnaðinum í mun til lestrartíðina, verður lestrarstuðulin aftur útgoldin frá tí tíðarskeiði, lesandi aftur gjørdist lestrarvirkin.

### 9.17 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum

Øll skeið verða eftirmett við skeiðslok. Studentar hava skyldu til at luttaka í eftirmetingunum við at fylla út skjøl ella munnliga, um skipað verður fyri umrøðu av einstøkum skeiðum ella útbúgvingini sum heild í plenum. Eftirmetingarnar verða brúktar av útbúgvingarleiðaranum og undirvísarum til støðugt at gera undirvísingina betri og styrkja læruúrtøkuna hjá studentunum.

Skeið verða eftirmett kvantitativt og einsæris eftir einum felags leisti galdandi fyri øll skeið á Setrinum. Tó er ikki nakað, sum forðar fyri øðrum eftirmetingum (serliga kvalitativum, t.d. samrøðum ella orðaskifti), um tørvur er á tí, ella tað verður hildið gagnligt.

### 9.18 Kærumøguleikar

Sí heimild um kærur í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kapittul 6a.

### 9.19 Vísindaligt rættlæti

Í ástøðiligu skeiðunum má studenturin fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt ikki at geva upp heimildir, so at villleiðing stendst av viðvíkjandi avriki hjá viðkomandi studenti. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru studentsins, eru fingnar. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum studenturin ikki sjálvur hevur skrivað ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur.

### 9.20 Nær studentar í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv

Studentar skulu í seinasta lagi hava staðið endaligt prógv 5 ár eftir, at tey eru innskrivað sum á útbúgvingini. Um studentur er ella hevur verið í farloyvi, verður farloyvistíðin løgd afturat freistini.

### 9.21 Treytir um broyting í námsskipan

Tá broytingar verða gjørdar í námsskipanini, verða studentarnir kunnaðir um tær og um í hvønn mun tey fylgja broyttu námsskipanini ella fylgja eldri námsskipan. Broytingar í námsskipanini skulu góðkennast í lestrarráðnum.

---------------------------------------------

**Broytingar, sum eru gjørdar í mun til útgávuna frá mars 2023 (sambært lestrarráðsfund 18.12.23):**

Undir próvtøkuhættir 9.9 er komið ískoytið niðanfyri:

**9.9.4 Verklig próvtøka**

**Verklig próvtøka. Sýning/framførsla av verki + samrøða við próvdómarar. Studenturin sýnir/framførir egið verk (10-12 minuttir til longdar) sambært verkætlan, sum er góðkend av skeiðsábyrgdara, og greiðir í samrøðu við próvdómarar greinandi frá verkinum.**

Harafturat er tabellin á síðu 19 broytt soleiðis, at tað til høgru fyri “Ástøðiligt skeið 1” stendur **“Skiftandi prófvtøkuháttur**” heldur enn “Skrivlig prófvtøka í 6 tímar”.

------------------------------------------